Heini mammubeiggi er 30 ára gamal. Hann er ógvuliga glaður fyri bilin hjá sær, fín klæðir og spennandi ferðir. Hann er altíð snøggur um hárið, og hann venur eisini nógv. Heini forvinnur 30 000 kr um mánaðin. Hann býr heima hjá foreldrum sínum.




**1.1** Heini skal gjalda $\frac{3}{10}$ av lønini í skatti.
Hvussu nógv hevur hann eftir av mánaðarlønini, eftir at skatturin er goldin?




**1.2** Í talvuni sæst, hvussu nóg Heini um leið brúkar til hetta ymiska.

**a** Hvussu nógv brúkar hann um mánaðin?

**b** Hvussu nógv hevur hann eftir av lønini um mánaðin?

| Útreiðslur | Til samans |
|---|---|
| Matur og drekka | 4060 kr |
| Klæðir og skógvar | 4210 kr |
| Persónlig røkt | 1050 kr |
| Ítróttur og frítíð | 1000 kr |
| Ferðing | 3200 kr |
| Telefon og telda | 1260 kr |
| Bilur | 2720 kr |

**1.3** Heini er altíð í penganeyð. Hann plagar at læna pengar frá mammu síni. Nú skyldar hann henni 12 600 kr, sum hann skal gjalda aftur yvir 3 mánaðir.
Hvussu nógv skal hann gjalda henni um mánaðin?

**1.4** Heini vil fegin hava egnan bústað, men so verður neyðugt hjá honum at minka um aðra nýtslu. Talvan vísir, hvussu nógv fólk við egnum bústaði vanliga brúka til hetta ymiska. Her eru ikki tiknar við útreiðslur til bústað og el.

**a** Hvat er tað, Heini brúkar serliga nógvar pengar til sammett við onnur í somu støðu?

**b** Hvat er tað, sum Heini ikki brúkar pengar til, tí hann býr heima hjá foreldrunum?

Heini hevur funnið eina íbúð, sum hann kann leiga fyri 6000 kr um mánaðin. Tá er el íroknað.

**c** Skriva eitt uppskot um, hvussu hann kann fáa ráð til tað.

| Útreiðslur | Til samans |
|---|---|
| Matur og drekka | 2520 kr |
| Aðrar gerandisvørur | 560 kr |
| Klæðir og skógvar | 660 kr |
| Persónlig røkt | 510 kr |
| Ítróttur og frítíð | 930 kr |
| Ferðing | 630 kr |
| Telefon og telda | 1450 kr |
| Bilur | 2270 kr |
| Innbúgv | 310 kr |